Skurðlækningasvið
Göngudeild 10E

LANDSPÍTALI
HÁSKÓLASJÚKRAHÚS

## Vegleiðing  um eftirviðgerð á litprikan / tatovering rundanum bróstvörturnar.

- Tygum kunna taka umvavið av um kvöldið, ella tá tygum koma heim.
- Best er um tygum eru í myrkari blusu, av tí tað kann blöða eitt sindur frávörtuni fyrsta samdögrið.
- Tygum kunna fara undir brúsu dagin eftir, men vaska varliga rundanum vörtuna og læt ikki brúsuna koma beinleiðis á. Turka varliga rundanum vörtuna við t. d. vatti.
- Tygum muga ikki klóra ella gníggja vörtuna.

## Vert at vita.

- Liturin á vörtuni kann blikna millum 40 til 60 prosent.
- Ljósari liturin á vörtunum bliknar fyrr.
- Tað er torfört at raka sama lit sum egna bróst hevur og oftast sæst ein lítil lit munur.
- Til næstu viðgerð / endurbötan kunna ganga 6 vikur, men ikki longur enn 6 mánaðir.
- Um tygum skulu í skannaran, er umráðandi, at tygum gera vart við, at tygum hava fingið litprikan, tí at skanningin kann geva eitt  skeift úrslit.
- Litprikan / tatoveringin tekur umleið eina viku at gröða, um so er at tað ikki hendir, eru tygum vælkomin at seta tygum í samband við skurðambulatoriið. B3, tlf 304500  lokal 54.

Maí 2013